Daewoo Nubira 1,8 CDX:

# Kvikur og væl útgjørdur Nubira

**Í september í fjør royndarkoyrdu vit nýggja Daewoo Nubira 1,6 SX. Nú ein dagin fingu vit høvið at royna bilin í 1,8 CDX útgávuni, sum er ein kvikari og betri útgjørdur bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Nubira er teknaður í samstarvi við italsku Pininfarina designfyritøkuna*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Viðførisrúmið kann latast upp við fjarstýringini, soleiðis at lúkan automatiskt fer upp*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Daewoo Nubira, ið er teknaður í samstarvi við italsku Pininfarina designfyritøkuna, kundi fyri tað verið evropeiskur, bæði hvat útsjónd og koyrieginleikum viðvíkur.

Eisini innan – instrumentborðið er sum í einum týskum bili í dýrara klassanum við træpanelum og alu-look í miðjuni. Rattið er »multijusterbart« og kann stillast, sum tað passar føraranum best. Setrini á CDX útgávuni eru betri og stúttari.

Bilurin er til fimm ferðandi, og 3-punkts trygdarbeltir og nakkapútur eru til øll.

Viðførisrúmið kann latast upp við fjarstýringini, soleiðis at lúkan fer automatiskt upp.

Nubira fæst við tveimum motorstøddum, 1,6 litur við 109 hk, og 1,8 litur við122 hk.

Hesin 1,8 CDX ið vit royndarkoyrdu, hevði t.d. el-síðuspegl, el-síðurútar, el-stik framman, klimaanlegg, køling í handskarúminum, fløguspælara við boks til 6 fløgur, fjarstýrt sentrallás til hurðarnar og baklúkuna, airbag framman og í síðunum. ABS bremsuskipan við EBD og skivubremsur framman og aftan.

Motorurin kraftar væl og larmar lítið, tað sama kann sigast um bilin sum heild.



*Nubira innan – har er alt sum skal til, træpanelir á instrumentborðinum og á hurðum og køling í handskarúminum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Daewoo Nubira 1,8 CDX**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,8 litur, 4 syl., 16V, bensin, 122 hk |
| 0-100 km/t | 9,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 14,1 km/l (bl. koyring) |
| Dekkstødd | 195/55-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 450,0 cm |
| Breidd | 173,0 cm |
| Hædd | 145,0 cm |
| Eginvekt | 1200 kg |
| Viðførisrúm | 405 litrar |
| Prísur | kr. 185.000,- |
| Søluumboð | P/f Esmar Simonsen Kambsdalur FO-530 Fuglafjørður Tel.444405 es@es.fo |

## Trygdarbeltir og airbag



Danmarks Transport Forskning hava gjørt eina kanning um brúk av trygdarbelti í bilum við ella uttan airbag, og um hvar í bilinum børnini sita. Úrslitið vísti, at airbag ikki ávirkar teirra brúk av trygdarbeltum, og at flestu børn sita á baksetrinum

*Kelda: Danmarks Transport Forskning*

## Vøkstur hjá Harley Davidson



Eftirspurningurin eftir amerikansku Harley Davidson motorsúkklunum er alsamt vaksandi. Roknað verður við eini sølu uppá 400.000 súkklur í 2007. Í ár verður sølan 317.000, hetta er ein vøkstur uppá 7 prosent í mun til í fjør

*Kelda: Motor Magasinet*

## DFDS sigla



## við BMW

Danska reiðaríið DFDS hevur gjørt avtalu við BMW í Týsklandi um at sigla við BMW-bilum til Onglands. Talan er um umleið 80.000 bilar árliga, sum verða fluttir sjóvvegis millum Cuxhaven í Týsklandi og Immingham í

# Peugeot 207 mini-MPV í 2006

**Fleiri nýggj Peugeot modell eru ávegis. Ein heilt nýggjur 407 kemur í vár, og komandi ár kemur ein nýggjur 207, sum eftir ætlan eisini skal koma sum mini-MPV í 2006**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*





*Peugeot 207 MPV sum eftir ætlan kemur í 2006. Um bilurin kemur at síggja júst soleiðis út er ikki heilt víst, men tað verður ivaleyst nakað í hendan stíl*

Allir Peugeot bilar koma í framtíðini at líkjast í ferðsluni við stórum opnum kølaragittari undir kúfangarahædd og stórum Peugeotlogo mitt framman.

Komandi ár kemur ein nýggjur Peugeot 207, sum avloysir núverandi 206. Árið eftir er ætlanin at 207 skal koma í eini MPV útgávu. Talan verður um ein mini-MPV við góðum sitiplássi til fimm persónar.

Fyrsti Peugeot 207 sum kemur í 2005 verður hatchbackútgávan við fimm hurðum og í 2006 kemur útgávan við trimum hurðum. Í 2006 koma so eisini 207 MPV og 207 Coupé Cabriolet.

*Kelda: FDM / Motor*



VIÐMERKINGAR

# Tillykke og velkommen Hr. Kirkeminister!

**Peter O.K. Olofson**
*Klaksvík*



Det er mig og en del andre komplet uforståeligt, at du som kirkeminister skal klandres for dit tilhørsforhold til Brødrene jvf. Portalen d. 10/2-2004. Den kritik må betegnes som værende et rent selvmål.

1) Biskoppen spørger om, hvad landsstyremanden eller Brødrene havde sagt til »um ein prestur ella ein limur í onkran heilt aðrari samkomu gjørdist ovasti leiðari í brøðrasamkomuni« ? De ville formodentlig have sagt det samme som os, der hører til folkekirken, at det var da et umage par at sætte sammen på denne måde. Brødrene er jo et frit og uafhængigt kirkesamfund, hvorimod folkekirken i mere end en forstand har indgået ægteskab med staten. Skulle sammenligningen holde, så skulle Brødrene have samme forhold til staten, som folkekirken har og derudover skulle Jógvan á Lakjuni ikke være kirkeminister men ærkebiskop.

2) Biskoppen »dugi heilt einfalt ikki at skilja, at samgongan ikki virðir fólkakirkjuna sum ein trúarfelagsskap, har ein skal vera limur« og derfor bør kirkeministeren være medlem af folkekirken. Vi andre forstår ganske enkelt ikke, at landsstyret lige pludselig skal gøres til et kirkesamfund, hvor kravet, for at blive landstyremand for visse områder inden for det verdslige regimente, er, at man er medlem af et bestemt kirkesamfund. Dette krav om, at dele af øvrigheden skal tilhøre et bestemt kirkesamfund, findes vist ikke i Den hellige Skrift. Her tales der snarere om, at vi skal bede for øvrigheden, hvad enten den består af kristne, hinduer, muslimer, hedninger, ateister, osv.og at enhver øvrighed skal styre med ansvar indfor Gud.

3) Biskoppens kritik er et selvmål, for kritikken er rettet mod den forkerte. Skal kritikken rettes nogen steder hen, så må det være til folkekirken selv. Altså, hvis biskoppen finder situationen uholdbar, så er det folkekirken, der skal skilles fra staten og ikke staten, der skal gøres til kirkesamfund. Det er vist elementær evangelisk-luthersk lære.

4) Når dette er sagt, er det også uforståeligt, at folkekirken skal overtages, og at landskassen fremover skal finansiere en stor del af et bestemt kirkesamfunds udgifter. Hvorfor kan vi, der hører til folkekirken, ikke betale selv? Det er en urimelighed overfor dem, der ikke hører til folkekirken.

Hvis lagtinget mener, at landskassen fremover skal betale til folkekirken for den grundregistrering (fødsler, navngivning, navneændringer og dødsfald), som folkekirken udfører via kirkebøgerne for samfundet, er det ikke andet end rimeligt. Men endnu mere nærliggende ville det nok være at lade den grundregistrering overgå til folkeregistret, så præsterne kan bruge tiden på det, der er deres egentlige kald. Og så betaler vi, der hører til folkekirken, naturligvis også alle udgifter selv.

Endnu engang: Tillykke til Jógvan á Lakjuni med embedet som landsstyremand og velkommen som kirkeminster. God arbejdslyst.

# Ein rættleiðing til Kristian Magnussen

**Heðin M. Klein, fyrrv. løgtingsmaður**



Í Sosialinum mikudagin 11. februar sigur Kristian Magnussen, nývaldur formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, at tað man hava verið av tilvild, at andstøðan á Føroya løgtingi hevur altíð havt annað umboðið í Norðurlandaráðnum, av tí at landsstýrissamgongurnar í Føroyum hava mangan verið so smalar.

Men hetta er beinleiðis ósatt!

Undirritaði sat á Føroya løgtingi, tá ið táverandi samgonga ímillum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin var so mikið stór, at hon, um hon vildi, hevði sjálv kunnað valt bæði umboðini í Norðurlandaráðnum. Men tað vildi hon ikki. Eg minnist, at málið varð viðgjørt í samgonguni, og tað var semja um, út frá eini demokratiskari áskoðan um samgongu- og andstøðusjónarmið, at andstøðan skuldi sjálv velja annað umboðið.

Nú skilst, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin av einihvørjari orsøk ikki hava somu áskoðan sum tá. Teir um tað. Men Tjóðveldisflokkurin hevur tíbetur ikki broytt áskoðan. Tað dámar mær væl.

Ein fyrrverandi floksformaður, sum ikki longur er okkara millum, var viðhvørt vanur at taka til týsku máliskuna – at tú varnaðist endamálið og varðst illa við:

»Man merkt die Absicht und wird verstimmt!«

Soleiðis er tað.

Men annað var kanska ikki væntandi?

# Framtíðar leikluturin hjá smáum kommunum

**Ein kanning millum kommunalar leiðarar um leiklutin hjá smáum kommunum í framtíðar økismenningini**

**GRANSKING**
*Tíðindi frá www.region.fo*

Granskingardepilin fyri Økismenning er í samstarvi við økismenningardepilin við Lærda Háskúlan á Akureyri (www.unak.is/rha) og Ålands Statistik och Utredningsbureau (www.asub.aland.fi) farin undir eina norðurlendska verkætlan við heitinum »Framtíðar leikluturin hjá smáum kommunum«. Verkætlanin byggir á eitt spurnarblað, sum verður sent øllum kommunum á Álandsoyggjunum, í Føroyum og flestu kommunum í Íslandi.

Endamálið við verkætlanini er, at kortleggja og greina, hvussu smáu kommunurnar arbeiða, til tess at møta framtíðar økismenningini, hetta við atliti til eitt nú demografi, kapasitetstrupulleikar og fjarstøðu. Er vegurin fram kommunusamanleggingar og/ella kommunalt samstarv? Hvørji stig eru tikin og hvussu virka tey? Eitt annað endamál, er at seta skjøtil á eina meiri skipaða norðurlendska gransking um smákommunur og teirra viðurskifti í økismenningini. Ein nærri lýsing av verkætlanin finnist á heimasíðu okkara www.region.fo - og vel Framtíðar leikluturin hjá smákommunum.

Í Føroyum verður spurnarblaðið sent til allar borgarstjórar, umframt antin umsitingarliga leiðaran ella varaborgarstjóran. Spurnarbløðini eru send út í hesari vikuni (viku 7) og verða ætlandi Granskingardeplinum í hendi aftur í síðstu viku í februar mánaða. Endaliga frágreiðingin frá verkætlanini fyriliggur á sumri í ár.

Verkætlanin er stuðlað av norðurlendska regionalpolitiska stovninum NordREGIO, sum hevur sítt høvuðssæti í Stockholm (www.nordregio.se).

Hava tygum spurningar viðvíkjandi verkætlanini, eru tygum vælkomin til at seta tygum í samband við okkum, siga Gestur Hovgaard, verkætlanarleiðari og Dennis Holm, granskari.

# Tá ið gentur og dreingir gerast vaksin

**Ritgerðarkapping á Fróðskaparsetrinum 2003-04**

**RITGERÐAR-KAPPING**
*Tíðindaskriv*

Í mars mánað 2003 lýsti Fróðskaparsetrið við ritgerðarkapping. Freistin at lata inn tilfar var 15. mars 2004. Fróðskaparsetrið hevur skipað fyri slíkum ritgerðarkappingum regluliga seinastu 30 árini. Seinasta kappingin var um gamlar bøkur, og hana vann Elin Mortensen úr Havn.

Evnið í ritgerðarkappingini hesaferð er:

Tá ið gentur og dreingir gerast vaksin.

Sóknast verður eftir lýsingum av skiftissiðum fyrr og nú í sambandi við, at gentur og dreingir verða vaksin. Hvørjar vóru og eru tær týdningarmiklu hendingarnar og broytingarnar, sum vekja ans og viðurkenning? Vit vita, hvussu rørd foreldur vóru fyrr, tá ið dreingirnir veiddu vaðanskalvan. Og hvussu errin tey eru nú t.d., tá ið sonurin skjýtur fyrsta málið. Nær eru foreldur rørd og errin av døtrunum?

Hvørjar hendingar vaktu og vekja ans í uppvøkstrinum hjá gentum og dreingjum? Hvat varð og verður gjørt burtur úr, tá ið gentur og dreingir fara um avgerandi mørk í uppvøkstrinum?

Talan kann vera um siðir í sambandi við skyldur, heimildir, ábyrgd, virðing, sum fylgja við, tá ið børn fara um markið, ið ger tey til vaksin fólk. Skiftið sæst ofta aftur í klædnabúna og øðrum viðvíkjandi útsjónd, hárgreiðslu og atburði yvirhøvur. Eru onnur eyðkenni?

Tey sum lata kappingini tilfar gera sjálvi av hvørjum tíðarskeiði tey arbeiða við. Tað kunnu vera egnar royndir ella ymiskt, sum tey hava hoyrt frá eldri fólkum.

Freistin at lata inn tilfar til kappingina er 15. mars 2004. Fólk eru vælkomin at seta seg í samband við Fróðskaparsetrið um okkurt er at spyrja um, annaðhvørt skrivliga ella við at ringja. Bústaðurin er: Setursskrivstovan, J. C. Svabos gøta 14, tlf. 35 25 00. Eisini ber til at senda teldubræv á setur@setur.fo

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomna tilfarið og virðislønir verða latnar fyri bestu úrslitini.